

**Kendi danski vinnulívsmaðurin Asger Aamund heldur fyrilestur**

## Vinnudagur í Norðurlandahúsinum

# ÁRSINS VIRKI

**Skrá fyri vinnudagin 7. apríl:**

| | |
|---|---|
| Kl. 13.00-13.15 | Formaðurin í Føroya Arbeiðsgevarafelag bjóðar vælkomin, Wilhelm M. Johannesen |
| Kl. 13.15-15.00 | Framløgur um føroyska vinnu og framtíðina: |
| | Fiskivinnan - framtíðar gongdin innan høvuðsvinnuna, Meinhard Jacobsen |
| | Hava smáar og fjarskotnar fyritøkur eina framtíð? Magni Arge |
| | Kunningartøknin - rembingar, ið ávirka vinnuna, Niels Chr. Nolsøe |
| | Ein framtíð uttan heimamarknað, Kjartan Kristiansen |
| | Útvegan av eginkapitali Vilhelm Petersen |
| Kl. 15.00 | Steðgur - kaffi o.a. |
| Kl. 15.40-16.00 | Vinnulív, vinnupolitikkur og framtíðin, Anfinn Kallsberg, løgmaður |
| Kl. 16.00-16.40 | Framtíðarsamfelagið og krøv til vinnuna, Asger Aamund |
| Kl. 16.40 | Ársins virki: Hví velja ársins virki, Jan Mortensen |
| | Umboð fyri dómsnevndina greiður frá arbeiðinum. Framløga - ein lýsing av útvalda virkinum. Landsstýrismaðurin í Vinnumálum handar ársins virki virðisløn. |
| Kl. 19.00-24.00 | Døgurði fyri luttakarum á Vinnudegnum á Hotel Føroyum |

Eftir harðbalnar tíðir gongur nú aftur framá hjá føroyska vinnulívinum. Vit eru komin til eitt vegamót við stórum rembingum. Sjónarringurin verður alsamt víðkaður við nýggju kunningartøknini. Oljuvinnan er komin á okkum. Og ríkisrættarligar broytingar standa fyri durum. Í strembanini at gera føroyska vinnulívið enn betri ført fyri at fáa sum mest burtur úr hesum rembingum, hevur Vinnuhúsið valt at halda ein vinnudag friggjadagin **7. apríl**.



Á hesum degi verður Ársins Virki valt. Innbodnir føroyskir røðarar fara at geva teirra boð upp á framtíðina, og kendi danski vinnulívsmaðurin Asger Aamund fer at siga sína hugsan um framtíðarsamfelagið og krøv til vinnuna.

Ert tú vinnulívsfólk og kundi hugsað tær at luttikið á vinnudegnum í Norðurlandahúsinum, so set teg í samband við Vinnuhúsið áðrenn **27. mars**. Kostnaður fyri tiltakið við døgverða er 800 kr.

VINNUHÚSIÐ
House of Industry

R. C. Effersøesgøta 30, FO-100 Tórshavn, Tel 31 18 64, Fax 31 72 78, fag@industry.fo






*Tað sigst, at klaksvíkingar ikki tíma at ganga til álvarsligar leikir, teir vilja heldur hava okkurt at flenna at. Og tað fáa teir í hesum leikinum*

# Frálíkur skemtileikur

*Seks í pyjamas man vera ein tann mest undirhaldandi leikurin, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag nakrantíð hevur spælt*

EYÐUN KLAKSTEIN

Tað kann valla blíva nógv betur, tá áhugaleikarar fara at spæla ein skemtileik.

Seks í pyjamas, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag frumsýndi fríggjakvøldið, er ein serstakliga undirhaldandi og skemtilig farsa um tað sum hendir, tá ólag kemur á familjulívið.

Og tey flestu mundu hava ilt við at lata sum einki, tá Adelborg Linklett gjørdi seg sum kátur og uppfinnsamur kokkur, ella tá Jan Gardar royndi at halda vónini og humørinum uppi.

– Nú er alt sum tað skal vera, pástóð maðurin í húsinum, meðan fløkjurnar og misskiljingarnar vóru fleiri, enn tær nakrantíð høvdu verið.

Einki hekk saman, alt var kolasvørt lygn, og tá tey, sum høvdu avtalað at lumpa hini, sjálvi vórðu lumpað, var fløkjan fullkomin.

**Nógv ferð**

Sum navnið gevur eina varisliga ábending um, eru tað seks leikarar í nýggja leikinum hjá Klaksvíkar Sjónleikarfelag, og teir standa seg sera væl.

Leikurin, sum er franskur, er sera væl umsettur, og fyri tað mesta er talan um livandi og vanligt gerandismál. Onkuntíð er onkur setningur í so pappírskendur, men tað er undantakið.

Og so gongur tað bara við fullari ferð mesta av tíðini, replikkirnar eru stuttar, og stóran part av tíðini snýr tað seg um samanspæl millum tveir ella fleiri leikarar.

Tá skal timingin verða góð, og tað var hon eisini til frumsýningina. Onkur einstakur svipsari var, men tað gjørdi einki við heildarmyndina av einum frálíkum leiki, og slíkt verður bara betri og betri, sum leikararnir verða enn tryggari við leikin.

**Vilja heldur flenna**

Seks í pyjamas man vera nakað av tí mest undirhaldandi, sum Klaksvíkar Sjónleikarfelag hevur spælt, og tað skal minni enn vanligt hugflog til fyri at ímynda sær, at leikurin verður væl móttikin.

Tað sigst, at klaksvíkingar ikki tíma at ganga til álvarsligar leikir, teir vilja heldur hava okkurt at flenna at.

Og tað fáa teir í hesum leikinum.

Har er skemt á høgum og láturligum støði, hendingarnar eru buldrandi komiskar, og tá Jan Gardar og Hans Hjalti Skaale skræða kokkaklæðini av Adelborg Linklett, er skemtið fullkomið – bæði tað við tí lokala dáminum, og tað sum øll kunnu flenna eftir.

Jú, tað ber sanniliga til at flenna eftir einum pyjamas...

# EBG-endakapping í Vestmanna 1. apríl

EBG (European Business Game) endakapping verður í Vestamanna 1. apríl 2000. Byrjað verður kl. 10.15. Vestmanna kommuna stuðlar kappingini og Fiskivinnuskúlin tekur sær av teimum praktisku fyrireikingunum, skrivar Vinnuhúsið.

Endamálið við EBG-verkætlanini er, at næmingabólkar á miðnámsskúlunum – við støði í einum góðum hugskoti – skulu stovna eitt fiktivt virki. Í EBG-verkætlanini arbeiða næmingarnir í bólkum frá 3 til 5 limir, og teir arbeiða við teimum somu fyribrigdunum sum fólk, ið fara undir at stovna egið virki. Til dømis skulu næmingarnir gera ætlan fyri virkisleiðslu, starvsfólkamenning, marknaðarførðslu, fígging, rakstrarætlan og joint venture. Í eini felags evropeiskari handbók verða tey fyribrigdini, sum næmingarir skulu ígjøgnum, og tær reglurnar, sum verkætlanin verður dømd við støði í, nærri lýst.

Árið í ár er serliga spennandi fyri Føroyar, tí at tann evropæiska endakappingin verður í Føroyum tann 5-9. juli. Í stýringarbólkinum, sum skipa fyri kappingunum í Føroyum; eru: Claus Reistrup, Undirvísingar- og mentamálastýrið, Katrin Zachariasen, Føroya Handilsskúli á Kambsdali, Joan Stampe, P/F Føroya Banki og Bjørgfríð Ludvig, Føroya Arbeiðsgevarafelag.




# Páskaferð

## ...til Aberdeen

**Frá Skírisdegi til 2. Páskadag**

**Skenehouse Rosemount**



Íbúð til 2 fólk..........fyri hvønn **3.250,-**
Íbúð til 4 fólk..........fyri hvønn **2.865,-**
Íbúð til 6 fólk..........fyri hvønn **2.700,-**

**Skenehouse Holborn & Whitehall luksus íbúðir**

Íbúð til 2 fólk..........fyri hvønn **3.525,-**
Íbúð til 3 fólk..........fyri hvønn **3.250,-**
Íbúð til 4 fólk..........fyri hvønn **3.112,-**
Íbúð til 5 fólk..........fyri hvønn **3.195,-**
Íbúð til 6 fólk..........fyri hvønn **3.066,-**



Eykanætur úr kr. 248,- pr. persón.

## Útferðir frá Skenehouse

**Hendingarrík ferð til Royal Deeside kl. 10.00 - 17.45**

Leiðin gongur inn í vakra Royal Deeside, landið hjá kongum og drotningum, og síðan 1856 summarbúðstaðurin hjá enska kongahúsinum. Vitja verður á Royal Burgh of Ballater, Balmoral Castle, Crathie Church og Lock Muick, har Drotning Victoria dámdi sera væl at vera. Ein spennandi túrur við kongiligari søgu.



**Kostnaður kr. 275,-**
Í minsta lagi 10 í ferðalagnum.

**Malt Whisky túrur kl. 09.30 - 17.00**

Ævintýrferð til byrjanina av Grampian fjøllunum eitt umráðið har, veðurlagið og jarðfrøðin passa so væl til whiskyframleiðsluna at helvtin av øllum ti skotska whisky'num verður framleitt her. Vitja verður á Ballindalloch Castle. Eigarin er MacPherson - Grant síðan 1546. Síðan verður farið til eitt vælkent whiskydistillari, har víst verður runt og greitt frá hvussu whiskyframleiðslan fer fram. Ein smakkur verður eisini at fáa. Vitja verður eisini í ti heimskenda whiskyhandilinum í Duffytown, fyri at síggja og smakka onnur fín malt-whisky sløg.

**Kostnaður kr. 275,-**
í minsta lagi 10 í ferðalagnum.



**Møguleiki er eisini fyri at byrja ferðina Pálmasunnudag. Frætti nærri á ferðaskrivtovu tygara.**

**Íroknað prísin er:** Flogferð fram/aftur innivist á íbúð á einum Skenehouse.

**Ikki íroknað:** Ferðaavgjald kr. 512,- og útferðir.

Ferðin kann bíleggjast á øllum ferðaskrivstovum.

Atlantic Airways
Tel 333 900 Fax 333 990